

**Søgan hjá Harry:**

# Føroyska gentan kemur inn í myndina

**Í fyrsta partinum av hesi røð varð greitt frá søguni hjá hermanninum Harry Wilson. Fyrst undir krígnum var hann har, tað rættiliga stóð á í Europa. Men so kom hann til Føroyar, sum var eitt paradís í mun til restina av Europa. Kríggið endar. Harry er komin til Havnar og hevur fingið eygað á Honnu, og so fær hann kjansin..**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**2. partur**

## Lívið hjá hermonnum í Havn

Í fyrsta partinum av hesi greinarøð er Harry komin til Havnar. Vit fara fyrst at taka ein stubba burtur úr frásøgn hjá Sofus Poulsen, sum búði í Havn ein part av krígnum, um lívið hjá hermonnunum í Havn. Hann greiðir frá:

"Í Havn bygdu bretsku hermenninir barakkir alla møguliga staðni. Yvir av hjá Bil Óla var ein "fish and chips" handil. Hvønn dag komu hermenn marsjerandi við sekkjapípum á odda oman á Vaglið, og tá vórðu vaktirnar skiftar út. Hermenninir høvdu vakt ymsa staðni í býnum. Eg plagdi at forarga soldátarnar, sum eg kendi, og spurdi teir, hvat slag av vápnum teir høvdu, sum gingu aftastir. Har gingu hermenn við sleggju í staðin fyri við riflu og við ketildrakt undir arminum. Hetta var revsingin fyri at hava gjørt okkurt ella at hava skikka sær illa á onkran hátt. Sleggjurnar skuldu so nýtast til at banka blikkdósir saman. Dósamatur var jú ein stórur partur av matinum hjá hermonnunum. Hesir máttu so banka dósirnar saman, so tær tóku minni pláss, tá dósirnar vórðu sendar aftur til Onglands til endurnýtslu. Tað var onkuntíð, teir klandraðust eitt sindur. Eg minnist serliga ein hermann, sum onkuntíð plagdi at fáa ov nógv upp í høvdið, og sum tá hevði hug at gerast eitt sindur harðligur. Eg minnist, at hann var tikin einar tvær ferðir av hernaðarpolitinum. Tá visti eg ikki, at hesin maðurin var úr Aberdeen.

Tá ið eg kom niður til Aberdeen at búgva, síggi eg, at hann starvast á fiskamarknaðinum sum landingarmaður. Eg spurdi hann, um hann ikki var í Havn undir krígnum. Hann gjørdist eitt sindur lotur, men eg sigi við hann, at eg minnist til hansara, og at hann plagdi at boksast eitt sindur."

## Hanna kemur inn í myndina

Nú koma vit til tann partin av hesi frágreiðing, har Jóhanna Apol kemur inn í myndina hjá Harry. Hon er dóttir Sonnu og Louis Apol. Tað er greitt frá hennara ætt í teirri røð, sum vit høvdu við Jakku á Sundi seinasta summar. Hanna og Jakku eru nevniliga systkinabørn.

Her skal minst møguligt takast upp aftur. Tó er tað ein áhugaverdur partur av hesi søgu, hvussu Apol navnið kemur til Føroyar.

Umleið 1918-19 kemur eitt hollendskt skip við eini saltlast á redina í Havn. Nakrir av manningini fara við einum báti í land. Ein av teimum var stýrimaðurin Louis Apol. Men tá ið teir ætlaðu sær at rógva umborð aftur, brast hann á við landsynningi, og tað var ómøguligt at rógva umborð. Hvat var so at gera, uttan at søkja sær lívd, har hon fanst? Louis dugdi eitt sindur av donskum og kundi spyrja seg fyri. Hann varð vístur inni á Reinerts Kafé (har sum Frelsunarherurin er nú), sum Jens og Gustav Reinert stóðu fyri. Her hitti Louis Sannu, sum var systir teir báðar og var dóttir Andreas Reinert í Norðradali. Louis fór avstað aftur í fyrsta umfari, og hann lovar at koma aftur. Tí trúi Sanna nú ikki rættiliga! Men ein dag kemur Louis aftur, og tey giftast. Tey fluttu fyrst til Hollands, har sonurin Eiko var føddur. Men Sanna treivst ikki í slættlendinum í Hollandi, og tey fluttu aftur til Føroyar. Fyrst vóru tey búsitandi í Havn. Síðan flyta tey Norðradals.

Tey fluttu so til Skopunar, haðani mamma Sannu var ættað og eisini búði tá. Í 1937 flyta tey aftur til Havnar.

Louis var ein fjølbroyttur maður. Hann var við at stovna Keypssamtøkuna, og hann var eisini virkin javnaðarmaður. Fyrstu árini sigldi hann sum kapteinur úti í heimi, men hevði eisini virksemi av



*Hermenn marsjera í Havn*



*Hermenn klárir at fara í kirkju ein sunnumorgin*